Fiskimenn og reiðarar nýggjan sáttmála:

# Status quo - tó við ávísum batum

**Tann 17. januar skrivaðu Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag undir nýggjan tvey ára sáttmála, eftir at semingsstovnurin hevði verið uppi í samráðingunum í tríggjar dagar**

SÁTTMÁLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Gamli sáttmálin hjá FF við reiðararnar varð uppsagdur til 1. desember 2004, og hini manningarfeløgini søgdu eisini sínar sáttmálar upp.

Óli Jacobsen, formaður í Føroya Fiskimannafelag, sigur, at samráðingarnar við reiðararnar byrjaðu 20. desember, og táverandi sáttmáli varð framlongdur, meðan samráðst varð.

– Vit høvdu fleiri uppskot til broytingar í sáttmálanum, og her var talan í flestu førum um rættingar av – eftir okkara metingum – skeivleikum í verandi sáttmála og uppskot um at gera sáttmálan greiðari.

Hann sigur, at tá ið samráðingarnar byrjaðu, hevði Føroya Reiðarafelag eina røð av mótkrøvum.

– Tey mest álvarsomu krøvini vóru, at fiskimenn skuldu luttaka í øktu oljuútreiðslunum, at samlaði manningarparturin skuldi minka við minkandi manning, har hesi viðurskifti ikki vóru galdandi frammanundan – og somuleiðis skuldi ein møgulig kryvjimaskina hava sín part.

Óli sigur, at reiðarafelagið eisini boðaði frá, at felagið gekk ikki við til nakra broyting í sáttmálanum, sum fór at kosta teimum so mikið sum eitt oyra.

– Vit avvístu hinvegin at minka um partin hjá fiskimonnum við nøkrum sum helst.

Semja var tó millum reiðarafelagið og øll manningarfeløgini um at endurskoða uppsagnarreglurnar.

– Hesin spurningur varð eisini fingin upp á pláss, áðrenn farið varð í holt við hinar spurningarnar.



*– Talan er ikki um tær stóru broytingarnar, men heldur um status quo, tó við ávísum batum, sum telja meira í innihaldi enn í peningi, sigur Óli Jacobsen, formaður í Føroya Fiskimannafelag*

### Semingsstovnurin

Óli sigur, at tá ið hinir allir spurningarnir komu til viðgerðar, rendu partarnir seg fastar, og semingsstovnurin varð boðsendur mikudagin 12. januar – bæði til samráðingarnar millum Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag og millum Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Føroya Reiðarafelag.

– Vit fóru undir royndirnar at fáa semju beinanvegin, meðan semingsroyndirnar millum FSN og reiðarafelagið vórðu útsettar.

Sosialurin kann upplýsa, at semingsroyndirnar millum FSN og RF vórðu útsettar, tí formaðurin í FSN, Ellintur Abrahamsen, noyddist avstað við Tjaldrinum.

Óli sigur, at fyrsti fundur saman við semingsmonnunum var tann 13. januar og so aftur, 14. januar, tá ið semingsuppskot varð lagt fram.

Hetta semingsuppskot vrakaði Føroya Fiskimannafelag.

– Ein nýggj roynd varð gjørd mánadagin, 17. januar, og hon endaði við, at nýggjur sáttmáli varð undirskrivaður um klokkan 17 hendan dagin, sigur Óli.

Hann vísir á, at tað eru ikki tær stóru broytingarnar í nýggja sáttmálanum í mun til undanfarna.

– Talan er ikki um tær stóru broytingarnar, men heldur um status quo, tó við ávísum batum, sum telja meira í innihaldi enn í peningi, sigur hann.

### Semjan

Óli vísir í fyrsta lagi á, at reglurnar um uppsøgn og endurgjald eru gjørdar greiðari, og eru nú felags fyri øll manningarfeløgini.

– Við broytingunum sleppa vit vónandi undan ógreiðum viðurskiftum í framtíðini.

Í øðrum lagi eru smáar broytingar gjørdar í reglunum um reiðskap.

– Tann mest ítøkiliga broytingin er, at hjá ísfiskatrolarum skulu tveir posar verða umborð í mun til tann eina, sum var nevndur í gamla sáttmálanum. Haraftrat eru avmarkingarnar, sum nevndar vórðu fyri partrolarar, strikaðar.

Í triðja lagi eru reglurnar um tollfríar vørur nú ikki bert galdandi fyri langfaraskip men fyri øll skip.

Í fjórða lagi er avtalan, sum feløgini gjørdu, tá ið tey fingu eftirlønarskipanina, framvegis útreiðsluneutral fyri rækjuskipini.

Í fimta lagi er ásett í nýggja sáttmálanum, at fer manningin á partrolarum niður um sjey, minkar manningarparturin við einum fjórðingsprosenti, um skipið hevur kryvjimaskinu.

Óli sigur, at henda regla tó er treytað av, at hon er galdandi fyri alla manningina.

– Hetta kann kanska sigast at vera eitt afturstig, men vit halda, at hetta samstundis stuðlar uppundir at bøta um arbeiðsumstøðurnar hjá fiskimonnum, sigur hann.

### Fýra protokollat

Aftrat nevndu broytingum í sáttmálanum, hava feløgini gjørt fýra sonevnd protokollat, sum eru hesi:

**a.** Um listaprísurin á olju fer upp um kr. 2,90 í einum samanhangandi 30 daga skeiði, skulu partarnir taka upp samráðingar um møguligt býti av teimum eykaútreiðslum sum kunnu standast av hesum.

**b.** Um livur verður tikin, kunnu hvørt einstakt reiðarí og manning avtala sínámillum, hvussu virðið av hesum skal býtast. Her kann sjálvsagt bert vera talan um eitt betri býti fyri manningina fyri at eggja henni at taka livur. Í tann mun hetta eydnast, verður sjálvsagt meira til báðar partar.

**c.** Vit hava frammanundan reglur í sáttmálanum sum siga, at manningin skal bert taka útgerð v.m. umborð, um fólkatrot er á landi til hetta. Verður hetta gjørt, skal løn gjaldast fyri tað. Hesar reglur eru nú strammaðar upp soleiðis, at tá ið skipið er í havn, skal manningin órógvast minst møguligt, tó soleiðis at neyðugt arbeiði verður útint. Umráðandi er, at fiskimenn eisini sjálvir gera vart við sín rætt, tá slík mál stinga seg upp – og sjálvsagt skal FF eisini gera sítt.

**d.** Tað er ein gamal trupulleiki, sum reiðarar meta seg hava, at tá mann-ingartalið fer niður, fer samlaði hýruparturin upp. Hetta er vegna yvirmannapartarnar, sum vaksa í prosentum, tá manningartalið minkar. Hesin trupulleiki skal takast upp í sáttmálaskeiðnum við tí í hyggju fáa eina skipan, sum er útreiðsluneutral.

### Óloyst mál

Óli Jacobsen ásannar, at tá ið sáttmálasamráðingar eru, liggja altíð mál eftir, sum í minsta lagi annar parturin vildi havt vóru loyst – og soleiðis er tað eisini í hesum førinum.

– Men tá ið partarnir hóast alt semjast, er tað tí, at hetta er ein avtala, sum teir hóast alt kunnu liva við, sigur formaðurin í Føroya Fiskimannafelag.

# Samráðingarnar bíða eftir formanninum

**Sáttmálasamráðingarnar millum Føroya Skipara-og Navigatørfelag og Føroya Reiðarafelag verða tiknar uppaftur mánadagin, 31. januar, tá ið formaðurin í FSN, Ellintur Abrahamsen, kemur í land aftur av Tjaldrinum**

SAMRÁÐINGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*– Eg dugi ikki at meta um útlitini fyri semju, tá ið samráðingarnar verða tiknar uppaftur, 31. januar, sigur Regin Nónstein. Formaðurin í FSN, Ellintur Abrahamsen, sum vit síggja á myndini, er í løtuni umborð á Tjaldrinum*

Regin Nónstein, sum hevur sitið í nevndini hjá Føroya Skipara-og Navigatørfelag síðan 1985, situr á skrivstovu felagsins, nú formaðurin, Ellintur Abrahamsen, er umborð á Tjaldrinum.

Hann sigur, at semingsmenninir, Terji Sigurðsson og Jóannes Djurhuus, hava biðið partarnar halda lágan profil, meðan bíðað verður eftir formanninum – og uppafturtøku av samráðingunum.

Regin sigur, at enn hava ongar veruligar samráðingar verið millum partarnar, síðan semingsmenninir komu uppí samráðingarnar.

– Vit fingu ikki hildið á við samráðingunum, síðan samráðingarnar slitnaðu, og semingsmenninir komu uppí, tí Ellintur Abrahamsen noyddist avstað aftur við Tjaldrinum.

Hann sigur, at Føroya Skipara- og Navigatørfelag tó hevði høvið at vera á fundi við semingsmenninar, har felagið kunnaði Terja og Jóannes um gongdina.

Hetta var, áðrenn Ellintur Abrahamsen fór umborð aftur á Tjaldrið.

– Men veruligu samráðingarnar verða ikki tiknar uppaftur fyrr enn mánadagin, 31. januar, tá ið Ellint-ur Abrahamsen kemur aftur.

### Nógvir fundir

Regin Nónstein sigur, at hann ongantíð áður hevur verið við til so nógvar samráðingarfundir sum hesaferð.

– Vit byrjaðu at samráðast við reiðararnar longu í november í fjør, og eg haldi, at vit higartil hava havt einar átta ella níggju fundir, har hugt og tugt hevur verið uppá tingini, sum hann tekur til.

Hóast felagið hevur lovað semingsmonnunum tøgn um samráðingarnar, staðfestir Regin kortini, at Føroya Skipara- og Navigatørfelag vil ikki niður í hýru.

Hann sigur seg ikki duga at meta um vónirnar fyri seming, tá ið samráðingarnar verða tiknar uppaftur.

– Tað er nú einaferð soleiðis, at reiðararnir vilja skerja hýrurnar – og tað geldir bæði í góðum og minni góðum tíðum, sigur Regin Nónstein og leggur aftrat, at felagið fer ikki við góðum at ganga við til niðurskurðir.